# Konsert A La

**Onki hóvasták. Vit hoyrdu og hittu countrylegenduna og Hollywoodstjørnuna, júst so sum maðurin í veruleikanum er, nú lívsins summar er farið at hallað. Kjarnin í countrytónleikinum er maðurin og guitarin og tann søgan, ið hann hevur at siga frá. Og tað var her og á henda hátt, at Kris Kristofferson hitti føroyingar**

KRIS KRISTOFFERSON
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Nýtt og gott gamalt. Hesi orð lýsa nokkso væl tað, ið var á skránni, tá countrylegendan Kris Kristofferson trein á pall í høllini á Hálsi týskvøldið.

Boðað varð frá frammanundan, at hurðarnar vórðu latnar aftur klokkan 20, so fólk í øllum aldursbólkum komu í góðari tíð, og bíðirøðin uttanfyri stóð oman móti svimjihøllini. Stúgvandi full høll – eini 1500 fólk - var klár at taka ímóti, tá ljósið skiftið klokkan 20 stundisliga.

Eyðkenda røddin á Peturi Rouch ljóðaði í hátalarunum. Hesin countrykennarin átti fyrstu orðini og hann greiddi hegnisliga frá søguni handan films- og countrylegenduna Kristofferson. Orðini um lívsleiðina vóru væl skrivað og lisin, og áttu at komið á prent í miðlunum.

## Inniligi veruleikin

Síðani trein Kris á pall. Ein hetja innan countrytónleik kom her einsamallur við guitara og munnhørpu.

Talan gjørdist um eina stilla og inniliga konsert, og eg haldi ikki eg fari skeivur tá eg pástandi, at hetta er tann konsertin í høllini á Hálsi í Havn, har ljóðstøðið hevur verið lægst.

Vit á okkara leiðum hava helst hug oftast at gloyma, hvat country í veruleikanum er/var. Hetta er jú vísusangur úr amerikonsku mentanini. Hetta er teirra troubadourmentan. At okkum so dámar betur lætt gloypiligu útgávurnar, at har fleiri mjúkar tónasetingar eru við, umframt lættar rútmur, er ein onnur søga. Hetta er tann síðan av søguni, ið ger

